# BankNordik broytir rentur og prísir

*BankNordik lækkar rentur á privatum innlánum. Rentubroytingarnar verða framdar til tess at viga upp ímóti teimum útreiðslunum, sum BankNordik hevur av innlánum hjá kundum bankans.*

Orsøkin til rentubroytingina er yvirskipaða gongdin á marknaðinum og áhaldandi negativa rentan hjá tjóðbankanum.

Broytingin hevur við sær, at innlánsrentur hjá privatkundum lækka sum lýst niðanfyri. Vanlig innlán undir 500.000 kr. verða undantikin negativari rentu, innlán omanfyri 500.000 kr. verða rentað við -0,75 % og pensjónsinnlán verða rentað við -0,75% frá fyrstu krónu. Til ber at hava upp til 3 innlánskontur uttan at gjalda negativa rentu, um samlaða upphæddin er undir 500.000 kr. Um kundar hava fleiri enn 3 innlánskontur, verður negativ renta goldin av hesum kontum.

| Upphædd | Nýggj renta | Rentubroytingin fær virknað |
|---|---|---|
| Vanlig innlán upp til 500.000 kr. | **0,00 % p.a.** | **1. mars 2020** |
| Vanlig innlán omanfyri 500.000 kr. | **-0,75 % p.a.** | **1. mars 2020** |
| Pensjónskontur | **-0,75 % p.a.** | **1. mars 2020** |

**Nærri kunning**
Í næstum fáa allir privatkundar kunning um, hvat broytingarnar ítøkiliga merkja fyri teirra innlánskontur, og hvørjir aðrir møguleikar eru umframt at hava peningin standandi á kontu við negativari rentu.

**Børn og ung undantikin**
Børn og ung undir 29 ár eru undantikin negativum rentum. Frá 1. mars 2020 verður rentan á øllum innlánskontum og pensjónskontum sostatt 0,0 % p.a.

## Broyttir prísir

Av handilsligum ávum broytir BankNordik niðanfyri nevndu prísir frá 1. februar 2020.

| Frágreiðing | Núverandi prísur | Nýggjur prísur |
|---|---|---|
| Saldufyrispurningur | 25 kr. | **50 kr.** |
| Inngjald á kontu, privat – avgreitt við kassan | 0 kr. | **25 kr.** |
| Inngjald á kontu, vinnuligt – avgreitt við kassan | 50 kr. | **100 kr.** |
| Stovnan av sjálvvirkandi gjaldi/flyting – føst flyting – framt av bankanum | 0 kr. | **40 kr.** |
| Stovnan av gjaldsavtalu – framt av bankanum | 0 kr. | **40 kr.** |
| Avmelding av BS-gjaldi – framt av bankanum | 50 kr. | **75 kr.** |
| Avvísing av BS-gjaldi – framt av bankanum | 50 kr. | **75 kr.** |
| Aftursending vegna væntandi dekning – BS-gjald og flytingar – framt av bankanum | 200 kr. | **250 kr.** |
| Flyting til aðra kontu í BankNordik – framt av bankanum | 25 kr. | **50 kr.** |
| Flyting umbiðin umvegis telefon, teldupost e.l. – framt av bankanum | 40 kr. | **60 kr.** |
| Flyting til kontu í øðrum peningastovni – framt av bankanum | 25 kr. | **50 kr.** |
| Gjalding við inngjaldskorti/girokorti – framt av bankanum | 25 kr. | **50 kr.** |
| Ískoyti fyri skundflyting/flyting sama dag – framt av bankanum | 0 kr. | **30 kr.** |
| Ískoyti fyri flyting sama dag til kontu í øðrum peningastovni – framt í Netbankanum | 1 kr. | **2 kr.** |
| Fráboðan um flyting – bræv til móttakara | 15 kr. | **40 kr.** |
| Kvittan fyri flyting – bræv til avsendara | 15 kr. | **40 kr.** |
| Netbanki áhugafelag, kvartárligt fast gjald | 30 kr. | **50 kr.** |
| Netbanki vinna, kvartárligt fast gjald | 225 kr. | **300 kr.** |
| Visa/Dankort, árligt kortgjald | 200 kr. | **250 kr.** |
| Mastercard Debit Standard, árligt kortgjald | 200 kr. | 250 kr. |
| Mastercard Gull kredittkort, árligt kortgjald | 900 kr. | **950 kr.** |
| Mastercard Platinum kredittkort, árligt kortgjald | 1.500 kr. | **1.600 kr.** |
| Fastur virðisbrævagoymslukostnaður, hálvárligt gjald pr. VP-goymslu | 17,50 kr. | **25 kr.** |
| Fast goymslugjald, útlendsk virðisbrøv – hálvárligt gjald | 0,2% p.a. min. 130 kr. | **0,25% p.a. min. kr. 130** |
| Umlegging av realkredittláni, íroknað møguligt ískoytislán | 7.000 kr. | **9.000 kr. og 10.000 kr. fyri 2 lán** |
| Avgreiðsla av byggimáli – ikki lyklaklárt býli | 15.000 kr. | **15.000 kr. og 16.000 kr. fyri 2 lán** |

**banknordik.fo** Broytingarnar verða eisini at síggja á banknordik.fo/prisir, tá ið tær fáa gildi.